# Nógvur línu-fiskur í Klaksvík

**Nøkur av línuskipunum, sum eru heimahoyrandi í Klaksvík, hava gjørt rættiliga góðar túrar undir Íslandi. Seinastu vikuna hava fýra skip landað millum 100.000 og 180.000 pund á Kósini**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinastu vikuna hevur flakavirkið Kósin í Klaksvík keypt nógvan línufisk frá skipum, sum hava roynt undir Íslandi.

Týsdagin í seinastu viku landaði Polarstjørnan 180.000 pund, og seinasta fríggjadag var Jákup B á Klaksvík við 150.000 pundum.

Mánadagin í hesi vikuni var Núpur inni við 120.000 pundum og Helena, sum er fyrrverandi Fuglfirðingur, hevði 100.000 pund.

Øll skipini hava verið undir Íslandi, og meginparturin av veiðini er longa, brosma og nakað av toski og hýsu.

Umframt veiðina hjá línuskipunum, hevur Kósin í Klaksvík eisini keypt upsa frá Beta í Saltangará.

# Stjórin í Fiskamarknaði Føroya sagt upp

**– Eg havi verið á Fiskamarknaði Føroya í átta ár. Hetta hevur verið ein áhugaverd og spennandi tíð. Vit hava havt gott og ógvuliga dugnaligt fólk, men tað skerst ikki burtur, at óvissan um bygnaðarbroytingar seinastu tíðina hevur verið strævin, sigur John Nielsen, ið gevst sum stjóri á Fiskamarknaðinum við árslok**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



John Nielsen er 40 ára gamal og útbúgvin fiskivinnufrøðingur úr Noregi.

Áðrenn hann tók við starvinum sum stjóri í Fiskamarknaði Føroya fyri átta árum síðan, var hann innkeypsleiðari á Føroya Fiskavirking við sæti í Saltangará, Tórshavn og á Toftum.

Hetta starv hevði hann í stívliga tvey ár.

John arbeiddi eisini út við 5 ár í Føroya Banka, har hann sat á vinnulívsdeild bankans.

## Gevst við árslok

Eftir 1. januar 2005 verður John Nielsen ikki longur stjóri á Fiskamarknaði Føroya.

Fyri stívliga fjúrtan døgum síðan segði hann seg úr hesum starvi. Hann hevur tríggjar mánaðar uppsagnartíð, og tað merkir, at hann verður leysur av Fiskamarknaði Føroya við árslok.

John sigur, at uppsøgnin sum so einki samband hevur við ætlaðu bygnaðarbroytingarnar á Fiskamarknaði Føroya at gera.

– Eg havi verið í hesum starvi nú í átta ár, og hetta hevur verið ein áhugaverd og spennandi tíð. Hinvegin skerst ikki burtur, at óvissan um ætlaðu bygnaðarbroytingarnar seinastu tíðina hevur verið strævin. Men vit hava havt gott og ógvuliga dugnaligt fólk, sigur hann.

## Fyrimunir og vansar

John ásannar, at ætlaðu broytingarnar, sum hava verið uppá tal nú í eina tíð, líkasum hava sett alt í eina ávísa tómgongd.

– Eg vil siga, at óvissan í ein ávísan mun hevur gingið útyvir trivnaðin á arbeiðsplássinum. Tá ið bygnaðarbroytingar eru uppá tal, veit eingin, hvat spyrst burtur úr, og tí kann tað tykjast, sum alt hongur í leysum lofti. Tú fært ikki sett tær nøkur framtíðarmál, tí tú veit ikki, um tú verður ein partur av virkseminum, tá ið broytingarnar eru framdar.

Spurdur, hvat hann heldur um tær broytingar, sum vóru ætlaðar, men sum nú fyribils eru lagdar á hillina, tí Ráfiskaseljarafelagið hevur tikið seg aftur, sigur hann:

– Jú, eg dugi at síggja ávísar fyrimunir við eini nýggjari uppboðssølu, men eg dugi eisini at síggja nakrar vansar, sigur John.

*– Óvissan um framtíðina hevur gingið útyvir trivnaðin á arbeiðsplássinum. Tá ið bygnaðarbroytingar eru uppá tal, veit eingin, hvat spyrst burtur úr, og tí kann tað tykjast, sum alt hongur í leysum lofti. Tú fært ikki sett tær nøkur framtíðarmál, tí tú veit ikki, um tú verður ein partur av virkseminum, tá ið broytingarnar eru framdar, sigur John Nielsen, stjóri*

## FMF heldur fram

Stjórin væntar, at virksemið hjá Fiskamarknaði Føroya fer at halda fram óbroytt, nú alt bendir á, at Ráfiskakeyparafelagið og Ráfiskaseljarafelagið ikki eru samd um ætlanina longur.

– Vit mugu bara ásanna, at avgerðin á eykaaðalfundi um at deila Fiskamarknaðin Føroya sundur í ein landingarpart og ein sølupart, er tikin á skeivum grundarlagi.

John vísir á, at ætlanin var, at Fiskamarknaður Føroya skuldi eiga ein helming av nýggju uppboðssøluni og ráfiskakeyparar og ráfiskaseljarar hin helmingin.

– Men hetta verður nú fyrilbils av ongum, og tí vænti eg, at virksemið heldur fram sum higartil, sigur stjórin sum er rættiliga sannførdur um, at hann gevst á Fiskamarknaði Føroya við árslok.

# Koppaður krani

Stóri kranin hjá Skipasmiðjuni var týsdagin fyri einum óhappi. Undir arbeiði nærhendis gomlu Marinustøðina, sum nú eitur Tjarnargarður, megnaði undirlendið ikki at halda til trýstið frá stóra arbeiðstólinum, sum fyrst smokkaði nakað niður, áðrenn kranin sjálvur koppaði.

– Vit kunnu bara staðfesta, at kranin er koppaður, og tað er einki serligt hjá okkum, sigur Poul Mohr, stjóri á Skipasmiðjuni.

– Tíbetur hendi ikki nakar skaði, uttan á kranan sjálvan, sjálvandi. Hevði hann koppað móti onkrum húsum ella tað, ið verri er, so kundi talan verið um heilt stóran skaða, so tað var kortini hepni í óhappinum, sigur skipasmiðjustjórin.

Kranin kostaði nýggjur hálva fimtu millión, so tað er einki at ivast í, at kostnaðurin av umvælingini er stórur, men sum Poul helt fyri, so er hann væl tryggjaður.

**-jm**




*Hevði hann koppað móti onkrum húsum ella tað, ið verri er, so kundi talan verið um heilt stóran skaða, so tað var kortini hepni í óhappinum, sigur Poul Mohr*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Havsins skor-steinar

Djúphavið goymir nógv loyndarmál.

Granskarar hava funnið nakrar umleið 60 metra høgar, hvítar "skorsteinar" á botninum í Atlantshavinum, sum vera hildnir at hava samband við innara partin av jørðini.

Granskarar siga, at úr hesum skorsteinum streymar vatn sum er 350 hitastig.

**-v.**



# Nógv á einum stað

**Arbeitt verður við at menna tænastudeplar kring landið, har borgarin fær høvið at avgreiða fleiri ørindi á einum stað. Mest sannlíkt verður tað Postverkið, ið fer at taka sær av hesum deplum. Bretar nevna hetta »One stop shop«**

TÆNASTA
*Edvard Joensen*

Arbeitt verður við eini ætlan um almennar tænastudeplar kring landið. Ætlanin skal latast landsstýrismanninum við vinnumálum, sum vónar at kunna hava uppskotið við á landsstýrisfund um hálvan oktober.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, sigur, at mett verður hóskandi at leggja slíkar deplar í samband við Postverk Føroya, sum er stovnur, ið hevur deildir kring landið, eins og stovnurin er í broyting í løtuni.

Talan kann vera um at leggja avgreiðslur, sum fyrr hava verið gjørdar á fleiri stovnum í eitt nú høvuðsstaðnum, saman á ein sovn onkrastaðni úti í lokaløkinum.

Ætlnain er at býta landið í fleiri stór øki, og so leggja ein slíkan avgreiðsludepil á eitt stað.

Sum dømi kann nevnast, at ein suðringur kann fara á eina skrivstovu í Suðuroy at avgreiða eini trý ymskk mál, hann skuldi gingið á tríggjar stovnar í Havn til at avgreitt. Slíkt sum at útfylla eitt oyðiblað, heinta einahvørja váttan ella slíkt, sum ikki krevur beinleiðis málsviðgerð, sigur Bjarni Djurholm.

Hann sigur, at tey, sum arbeiða við hesum uppskotinum, hava skeitt at eini enskari skipan, sum bretar nevna »One stop shop«, har hugskotið júst er at savna fleiri tænastur á einum stað.

Nakað, sum líkist tí, er longu at finna á Snarskivuni hjá Tórshavnar Kommunu, vísir Bjarni Djurholm á.

Hann leggur dent á, at enn er alt á fyrireikingarstøði, og at slíkt sum at flyta tæanstur, má viðgerast saman við teimum landsstýrismonnum, sum hava tær ávísu tænasturnar sum sítt øki.



*Líkt er til, at fleiri smá bygdarposthús fara at lata aftur nakað skjótt. Ístaðin koma so stórir tænastudeplar, sum skulu hýsa posthúsi og øðrum almennum tænastustovnum kring landið*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Tilboð í Gásadali

**Arbeiðið upp á at gera vestara inntakið til Gásadalstunnilin er boðið út, og tilboðini innkomin**

SAMFERÐSLA
*Edvard Joensen*

Farið verður undir at gera inntakið til Gásadalstunnilin Gásadalsmegin í ár, sigur Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki.

Biðið er um tilboð upp á arbeiðið, og onkur tilboð eru komin, sum støða nú fer at verða tikin til, sigur Oyvindur Brimnes.

Men játtanin til arbeiðið er so mikið lítil, at tað verður bara arbeitt øðrumegin í senn. Hesaferð verður farið undir at gera vestara inntakið, sigur hann.

Eisini er biðið um tilboð upp á part av vegagerðini oman fyri Skála, og har er støðan sum í Gásadali. Tilboð eru at taka støðu til, men heldur ikki har røkka pengarnir serliga langt, og als ikki til at gera arbeiðið liðugt.

Oyvindur Brimnes sigur, at allar játtanir hjá Landsverki verða brúktar í ár, uttan tann til arbeiðið í samband við tunnilsgerðina í Suðuroy.

Har hevur gingið í so striltið at bora, at teir verða ikki lidnir við ætlaða setningin ár, sigur stjórin á Landsverki.



*Tilboð eru komin inn upp á arbeiðið at gera tunnilsinntakið í Gásadali liðugt*

# FK í Vágum byggir út

**Bygt verður upp í handilin hjá Føroya Keypsamtøku í Miðvági. Sjálvur handilin fer at vaksa við eini helvt**

ÚTBYGGING
*Edvard Joensen*

**Mivági:**
Føroya Keypsamtøka í Vágum byggir út. Handilin hevur leingi verið og trongur, og nú verður hann víðkaður við umleið helvtini av gólvvíddini afturat.

Tað hevur leingi verið eitt ynski um at fáa handilin víðkaðan, tí ov trongt er, sigur Ingi Joensen, sum er leiðari í FK í Miðvági. Nú er stigið so tikið, og handilin fer at vaksa við eini helvt.

Ingi Joensen sigur, at tá Vágatunnilin lat upp, merktu tey ein vøkstur í kundatalinum í Keypsamtøkuni í Miðvági. Kundatalið hevur lagt seg í eina støðugari legu nú, men er framvegis væl hægri, enn tað var, áðrenn tunnilin lat upp. Talan er í ávísan mun um fremmandafólk, sum hava ørindi á flogvøllinum og so keypa inn, áðrenn tey fara til hús aftur.

Útbyggingin, sum nú verður gjørd, skal væntandi vera liðug seinast í november, sigur Ingi Joensen. Bygt verður upp í handilin suðureftir. Verandi veggur verður so tikin niður, og allur handilin, sum hann er, verður innrættaður av nýggjum, sigur Ingi Joensen. Talan verður um heilt nýtt innbúgv eisini, sigur hann.

Hvat útbyggingin fer at kosta samlað, veit hann ikki at siga nágreiniliga enn, men sjálvur bygningurin fer at kosta umleið eina milión. So kemur innbúgv og slíkt aftuat.



*Bygt verður upp í handilin hjá Føroya Keypsamtøku í Miðvági. Útbyggingin fer at víðka gólvvíddina við eini helvt*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Játtanin brúkt

**Vestmanna Kommuna hevur sagt tveimum fólkum úr starvi, tí viðlíkahaldsarbeiði og slíkt, sum gerast skuldi, er liðugt fyri í ár**

KOMMUNUTÍÐINDI

Tveir tímaløntir arbeiðsmenn hjá Vestmanna Kommunu hava fingið at vita, at einki arbeiði er til teirra restina av árinum.

– Tað kemst av, sigur Gunn Joensen, borgarstjóri í Vestmanna, at játtanin, vit hava sett av til slík arbeiði í ár, er brúkt. Tað, sum gerast skuldi, er gjørt, og so er ikki meira, vit kunnu brúka hesar menninar til í løtuni, og tískil hava teir fingið uppsøgnina.

Gunn Joensen hevur boðað frá, at hon stillar ikki upp aftur til kommunuvalið í heyst. Hon sigur, at hon veit ikki fyri vist, hvussu vorðið er við upstilling í Vestmanna, men sigur seg hava frætt, at einir tríggir listar skulu vera á veg. Ein kvinnulisti er teirra millum, sigur hon seg hava fingið at vita.

**ej**